HOYVÍKAR SKÚLI

# Skúlastýrisfundur

Týsdagin, 2. november 2016 kl. 16:30

| | |
|---|---|
| **Á fundinum vóru:** | Una Matras, Karin Dahl, Birgir Kass, Bjørghild Djurhuus og Manne Persson |
| **Avboð:** | Jógvan Arge |
| **Skrivari:** | Hans Jón Thomsen |

## Skrá

**Nýtt frá leiðslu/skúla:**

Greiða er funnin á, hvussu vit gjalda fyri klatripyramiduna frá VILT.

200.000 kr. verða goldnar nú beinanvegin. Hetta er gjaldið fyri sjálva pyramiduna og undirlagið.

Kostnaðurin fyri flutningin og uppsetan verður goldin, tá klatripyramidan verður sett upp.

Miðað verður eftir, at klatripyramidan verður sett upp, tá veturin er av.

**Nýtt frá lærarum:**

Einki nýtt frá læraraumboðnum í skúlastýrinum.

**Nýtt frá Tórshavnar kommunu:**

Einki nýtt frá Tórshavnar kommunu.

**Nýtt frá foreldraumboðunum:**

Avgjørt varð at skipa fyri átakinum "Lán einglaveingir og lat endurskin" fríggjadagin 2. desember 2016.

Foreldraumboðini í skúlastýrinum, skrivarin, varaskúlastjórin og skúlastjórin í Hoyvíkar skúla luttaka.

Karin Dahl setur seg í samband við Ráðið fyri ferðslutrygd og lænir veingir og fær endurskin.

Fundurin lokin kl. 18:40